# Upp, gleðist allir

*Orð: Thomas Kingo / J. Dahl týddi / Lag og satsur: Knút Olsen 1972*




2. Burt sút úr øllum hjørtum nú!
Kom heiløg gleði, so í trú
vit Jesus kunnu fagna
við bøn og tøkk av hjartans grund,
tá trygd skal eiga lív og lund
og lov, sum ei skal tagna.

3. Guð, lat tín frið, sum hægri er,
enn mannavit kann fata her,
várt hjarta so væl varða
í Jesusi, at okkum hjá
tann jólagleði finnast má,
sum aldri burt skal fara!